## Skjalasavnsdagur verður 12. nov.

Triðja árið á rað verður tiltakið Skjalasavnsdagur á Landsskjalasavninum á Debesartrøð. Skjalasavnsdagur er eitt felags norðurlendskt tiltak, »Arkivernes Dag«, har skjalasøvn í Norðanlondum hava opið hús sama dag. Skjalasavnsdagurin 2005 verður leygardagin 12. november.

Landsskjalasavnið hevur opið hús frá kl 14 til kl 18. Høvi verður hjá vitjandi at vitja lesistovu og nærgoymslur. Eisini verður ein framsýning undir evninum »Torv og torvsskurður«. Ymisk skjøl, sum hava við evnið at gera verða sýnd fram, men eisini ber til at síggja onnur skjøl.

Kl. 15 heldur Petur Jacob Sigvardsen fyrilestur í Loftstovuni á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, sum hann kallar: *Savnindi í granskingarhøpi*. Petur Jacob hevur skrivað ritgerðina *Torv og torvskurður í søgu og siðsøgu*, sum hann hevur arbeitt við í nógv í ár. Eisini hevur hann givið út *Úr Gjáar søgu* í 4 bindum. Aftan fyri arbeiðið við hesum báðum verkum liggja drúgvar skjalarannsóknir. Petur Jacob fer í fyrilestrinum at greiða frá hesum arbeiði. Eisini verður høvi til at síggja avrit av teimum savnindum, sum Petur Jacob hevur savna saman í sambandi við arbeiði sítt. Sí eisini http://www.lokalarkiver.dk/arkivdag/index.htm

## Eksem av stuðulsarmbondum

Ljósareyðu armbondini við áskriftini "Støt Brysterner", sum Kræftens Bekæmpelse í Danmark selur til frama fyri granskingina í bróstkrabba, eru undir illgruna, fyri at vera orsøk til eksem.

Húðlæknin Christian Avnstorp á Dansk Dermatologisk selskab sigur við útvarpsrásina, DR Vejle, at tey hava fingið fleiri áheitanir frá fólki um hesi armbond. Í løtuni verða armbondini kannaði á Teknologisk Institut.

Úr Kræftens Bekæmpelse verður sagt, at tey sjálvandi eru sera kedd av hesum, men bíða eftir úrslitinum av kanningini, áðrenn avgjørt verður at steðga søluni av armbondum.

**nud**

## Lisberg og Enni í Lounge

Leygarkvøldið fara Bjarni Lisberg og Brandur Enni at spæla í Hafnia Lounge, hetta er fyrsta vikuskiftið aftan á Singer/Songwriter kappingina í Hafnia Lounge. Kappingin hevur verið sera væl vitja, og nú skal tann alsamt eldra fyrrverandi barnastjørnan Brandur Enni royna at halda støðinum.

Familjunøvnini Lisberg og Enni eru tengd at tónleiki, og boða frá høgari góðsku.

## Deiggj spæla ístaðin fyri Basalt

Tað verða Deiggj og ikki Basalt, ið spæla til dans í Kagganum hetta vikuskiftið. Vit hava fyrr skrivað, at Basalt skulu spæla, men hetta er nú avlýst, og í staðin verður frálíkur dansivinarligur og 70'ára tónleikur við Deiggj.

Deiggj hava millum annað spælt sum Gasolin Jam fyrr í ár, og Gasolin løg vera eisini á skránni í Kagganum hetta vikuskiftið, men eisini bólkar sum Deep Purple, Eric Clapton og ymiskt føroyskt, ikki minst nakrir Deiggj klassikarar.

**nud**

## Livandi tónleikur í Glitni

Aftur hetta vikuskiftið er livandi tónleikur í Glitni, Sum vant undirheldur hústroubadururin Andreas Arge í kvøld og sunnukvøldið. Fríggjakvøldið er tað Dansiorksetrið, sum fer at seta lív í.

Sambært Glitni, gerst Andreas Arge alsamt betur umtóktur við sínum breiða tónleikarúrvali. Dansiorkestrið við Erling Berg á odda fer so løgið, sum tað ljóðar, at spæla til dans. Erling, ið hevur fortíð í bólkinum Driv, hevur teir báðar Paula og Sverra afturat sær.

**nud**



# Allahalgannakonsert í Vágs kirkju

Sunnudagin 13. november kl 18 hevur Kirkjukórið Ljómur árligu allahalganna konsertina undir leiðslu av Dorte Tilma, sum stjórnaði kórinum á summarsangferðini til Norðurlond og Spaniuland.

Oddur Hentze og Ulf Nordlund fara við blásarunum Suðuroyar Konsert Band at seta dám á hátíðardagin, sum øll árini eisini hevur verið offurgudstænasta. Sermerktur stemningur er, tá ið kirkjufólkið fer syngjandi innar í kór, hugfarsliga heystarsálmin eftir Robert Joensen: »Nú hvítna tindar fjøllum á…«

# Royndarætlan við ungdómshúsi á Sandi

**Ungmannafelagið Virkið og Sands Kommuna hava gjørt avtalu um barna- og ungdómsvirksemi í Virkinum komandi vetrarhálvárið**

UNGDÓMSHÚS
*Jákup Mørk*



*Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri, tykist vera spentur um, hvussu royndarátakið við ungdómshúsi fer at eydnast*

- Hetta er ein roynd at geva ungdóminum á Sandi eitt meira fjøltáttað mentanarlív í vetrarhálvuni.

Soleiðis lýsir Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri, nýggju avtaluna, sum Sands Kommuna hevur gjørt við Ungmannafelagið Virkið.

Avtalan inniber, at ungmannafelagið og kommunan komandi hálva árið gera eina royndarverkætlan, har eitt skipað ungdómsvirksemi skal fáast í eina meira fasta legu, enn tað higartil hevur verið talan um.

- Hetta er sum so ein ætlan, sum bygdarráðið hevur havt í eina tíð. Og nú hava vit so gjørt av at seta eina royndarverkætlan í gongd, sigur Páll á Reynatúgvu.

- Og tað er ikki heilt av tilvild, at vit hava valt vetrarhálvuna. Um summarið er serliga fótbóltурin ein savningardepil fyri ungdómin, men um veturin eru tilboðini nakað nógv færri. Enn eru vit ikki komin á mál við eini ítróttarhøll, og tað í sjálvum sær avmarkar ítróttarmøguleikarnar rættiliga nógv. Tí er hetta fyrst og fremst ein roynd at víðka um tilboðið til ungdómin í oynni. Vónin er sjálvandi, at hetta fer at eydnast væl, men tað verður so nakað, sum vit koma at eftirmeta, tá átakið hevur staðið sína roynd, sigur hann.

Tað er Erling Arnason, sum er settur sum leiðari fyri tiltakinum, sum fyribils er skipað við fýra kvøldum. Mána- og mikudag millum kl. 15 og 18.30 er opið fyri børnum um 7-12 ára aldur. Týs- og hósdag eru hølini ætlað teimum, sum er 13 ár og eldri. Tá verða hølini opin millum 16 og 18.30 og frá 19.30 til 21.